# Tá tað eydnast

**Framsýningin »Býarløg« er poetisk og undurvøkur og prógvar týðiliga, at tað stendur betur til við føroysku listini, enn danskir ummælarar vilja vera við í løtuni**



*Rúmið og ljósið spælir saman við verkunum*

## Ummæli



Kinna Poulsan

Framsýningin "Býarløg" hjá Hanna Bjartalíð, Anker Mortensen og Hansinu Iversen í Müllers Pakkhúsi hevur rætt og slætt tað, sum skal til, fyri at ein framsýning eydnast til fulnar. Hon er poetisk, undurvøkur og so vekir hon eisini viðkomandi undran hjá áskoðaranum, sum samstundis kann fegnast um, at tað eyðsýniliga stendur betri til við føroysku listini, enn danskir ummælarar fyri tíðina vilja vera við.

### Rúmlig avbjóðing

Tá tað nú eru trý av okkara bestu listafólkum, sum sýna fram, er tað ikki so nógv tað høga góðskustøðið, men meira handfaringin av framsýningarhølunum, sum kemur óvart á. Tí Müllers Pakkhús er ikki lættasta hølið at fáast við, tá talan er um uppheinging av listaframsýningum. Rúmið er so nógv í sær sjálvum við skeivum vinklum og imponerandi grótveggjunum, sum skjóta seg fram og aftur í rúminum, og hetta elvir lætt til trupulleikar, tá listaverk skulu plaserast. Á onkrum framsýningum í Müllers Pakkhúsi hava vit sæð fríttstandandi upphangstalvur, sum møguliga eru praktiskar, men sum jú fullkomiliga fjala vakra rúmið. So er betri at síggja eina framsýning sum hesa, her verkini spæla framúr væl saman við hølinum, og tú eisini fært eina kenslu av, at hølið er ein umráðandi partur av sjálvum hugskotsgrundarlagnum undir framsýningini.

Uppheingingin av verkunum hjá teimum trimum listafólkunum er ymislig og væl hugsað bæði í mun til heildina og einstøku listaverkini, sum, tó at tey eru rættiliga ymisk, hanga væl saman í eini heild í samskifti við hvørt annað; stóru myndirnar hjá Hansinu Iversen, sum hanga á endavegginum eitt gott petti út frá sjálvum múrinum og smáu myndirnar hjá Anker Mortensen, ið eru settar inn í tann óslætta grótveggin og so myndirnar og objektini hjá Hanna Bjartalíð, ið á ymsan hátt standa og liggja á gólvinum og á plattum.

### Tað stórbæra, tað inniliga og tað eyðmjúka

Sum sansaligar ovursjónir hanga myndirnar hjá Hansinu Iversen á endavegginum og lýsa móti áskoðaranum, tá hann trínur inn í rúmið. Hansina Iversen er nógv broytt, síðani eg seinast sá hennara myndir og til ber at staðfesta, at hon aftur hevur flutt seg nógv, eisini í mun til fyrimyndir sum Mark Rothko og Ninu Roos.

Myndirnar eru enn nonfigurativar við rundleiddum formum, og listakvinnan fæst enn við rúmdina í myndunum, ið gerst alsamt meira víðkað og samansett. Men í mun til áður tykjast nýggju myndirnar heldur flatari við meira eindimensionalum formum, ið breiða seg um allan myndaflatan. Litirnir eru gløðandi heitir, myrkt brúnt við einum næstan ósjónligum bláum farra, ið svalir og javnvigar í mun til tann appilsingula og reyða litin vinstrumegin í myndini. Í miðgrundini liggur ein heitur sóljugulur, rundleiddur formur á skák í spenta myndarúminum, ið tykist vera á tambi sum beint áðrenn eina spreinging av onkrum slag.

Sami áhugin fyri tí organiska, livandi vøkstrinum hómast somuleiðis í smáu myndunum hjá Anker Mortensen, tó at tær eru púra ymiskar í mun til myndirnar hjá Hansinu Iversen í innihaldi, estetikki fyri ikki at tala um støðd. Smáu støddirnar draga áskoðaran tætt at myndunum og geva eina inniliga uppliving, sum eisini ber brá av mystikki og átrúnaði, til dømis í fleiri av træmyndunum, ið sipa til gamlar halgimyndir (ikonir). Myndevnini eru rættiliga ymisk, men í fleiri myndum hómast eitt landslagsskapilsi, sum á abstraktan, fabulerandi hátt tykist bera fram kenslur av eydnu, lættleika og einum eyðmjúkum og endaleysum takksemi. Anker Mortensen er í sínum myndamáli ikki óskyldur Ingálvi av Reyni í teimum rørandi einfaldu vatnlitamyndunum, sum Ingálvur málaði tey seinnu árini.

### Endurnýggjað bygdamyndevni

Teir smáu húsaskulpturarnar hjá Hanna Bjartalíð kenna vit aftur frá Heystframsýningini í fjør, men nú hevur listamaðurin skapað fleiri av hesum sermerktu standmyndunum, ið eru so originalar og fínar, at um Listasavnið ikki rennur oman á leistum í Müllers Pakkhús at ogna sær nakrar, - ja so skilji eg einki. Hetta er forrestin eisini galdandi fyri hini bæði listafólkini – og nú verður eisini betri pláss í Listaskálanum, nú Grafiski Verkstaður Føroya er fluttur oman á Skálatrø.

Tað er okkurt barnsligt og frítt yvir húsaskapilsunum hjá Hanna Bjartalíð, ið minnir um kroysurnar, børnini plagdu at byggja fyrr. Samstundis er eingin ivi um, at tað er ein vaksin listamaður, ið stendur aftan fyri tær mongu detaljurnar sum til dømis glasvindeygu og gardinur, eins og tær poetisku litsamansetingarnar geva okkum varhugan av eini kenslubornari listamannasál. Myndevnisringrásin hjá Hanna Bjartalíð hevur ofta snúð seg



*Sansaligar ovursjónir hjá Hansinu Iversen*

> *»Eg vil til ein og hvørja tíð heldur hava erligar ákoyringar enn tey deymutu føroyavinaligu ummælini, sum altíð vóru prinsipielt positiv á teirra serliga, eitt sindur niðurlátandi hátt«*
>
> *Kinna Poulsen*